ÍTRÓTTARBLAÐIÐ
Sosialurin 2. desember 2009

# Brúktu lasara ímóti Ronaldo


Barcelona-áskoðarar meddaðu við lasarastrálu eftir Cristiano Ronaldo, tá Barcelona tók ímóti Real Madrid sunnudagin
Mynd: Polfoto/AP

**Nakrir viðhaldsmenn hjá Barcelona royndu at blenda Ronaldo við sterkum lasarastrálum undir spanska stórdystinum, sum var sunnudagin**


heris@sosialurin.fo
Heri Simonsen

Longu tá 12 minuttir vóru farnir av dystinum millum Barcelona og Real Madrid royndu ávísu Barcelona-viðhaldsmennirnir at blenda Ronaldo, tá hann skuldi taka eitt fríspark uttanfyri brotsteigin hjá Barcelona.

Spanska ítróttarblaðið, AS skrivar, at Ronaldo, Pepe, Arbeloa og Casillas vóru raktir av lasarastráluni. Realmálverjin, Iker Casillas fortaldi dómaranum, Undiano Mallenco um lasaran, men dómarin nevndi ikki lasarastrálurnar í síni dystarfrásøgn.

Eric Abidal hjá Barcelona slóg alt upp í glens, og sigur við AS, at spælarnir hjá Barcelona eru somikið skjótir á fótum, at teir megnaðu at renna undan lasarastráluni.

Jorge Valdano, stjóri í Real Madrid segði við spanska ríkissjónvarpið, at hann lastar ikki FC Barcelona, men hann lastar tann ella tey, sum framdu ógerðina.

- Hetta má kannast fyrst og fremst, tí hetta er heilsuskaðiligt. Ronaldo var ikki raktur í eyguni, og tí fekk hann ikki nakran skaða, undirstrikar Valdano.

Fyri stuttum fekk italska felagið, Napoli 15.000 evrur í bót, tí nakrir áskoðarar hjá Napoli brúkti lasara ímóti einum spælara hjá mótstøðuliðnum.

Sambært einum øðrum sponskum ítróttarblaði, Marca høvdu Barcelona-áskoðarnir, sum brúktu lasara skipað seg, áðrenn stórdystin sunnudagin. Teir høvdu gjørt seg út við lasarum, sum eru átta ferðir sterkari, enn loyvt er.

Felix Navy, lækni hjá La Paz sjúkrahúsinum í Madrid sigur, at sterku lasarnir kunnu gera so stóran skaða á eyguni, at tað ber ikki til læknaliga at rætta uppá skaðan aftur.

# Liggja til uppflyting

**Hondbóltsharrarnir hjá ÍF Føroyum vunnu um vikuskiftið móti KSG, og nú liggur liðið á uppflytingarplássi**


jakup@sosialurin.fo
Jákup Mørk

Dysturin bleiv, sum ikki einaferð, sera spennandi og við einum megnar endaspurti kláraðu føroyingarnir at venda einum hóttandi tapi til ein sigur uppá 26-23, eftir hálvleiksstøðuna 14-10. Føroyski toppskjúttin, Bjarni Wardum, var tíverri ikki tøkur til dystin og nervaði tað liðið eitt sindur.

Dysturin byrjaði væl fyri ÍF Føroyar, og teir løgdu seg á eina tveymáls leiðslu frá byrjan. Men KSG vildi ikki lata munin blíva størri og teir kláraðu at hanga í. Tað var serliga einstaklingaavrik frá KSG sum var orsøkin til at teir kláraðu at hanga í, meðan tað føroyska spælið var baserað uppá uppspæl og tað meira taktiska sum góvu føroysku málini. Beint fyri hálvleik komu nøkur skjótáleyp til føroyinganir sum harvið fingu økt um munin til 4 mál.

Eftir hálvleikssteðgin var tað líkasum at føroyinganir vantaðu at sigurin fór at koma av sær sjálvum. KSG fekk loyvi til at stýra tempo-i í dystinum og kom spakuliga gjøgnum teir fyrstu 15 minutturnar inn aftur í dystin.

Tá tað so stegaði heilt upp hjá føroyingunum fekk KSG lagt seg á odda 22-20 bert 8 minuttir fyri dystarlok. Nú sá tað veruliga út sum næsta tapið skuldi koma í ár. Men Ári Rouch valdi at broyta tað eina annars sera trygga 6-0 verju til eitt meira offensiva 5-1 spæl. Tað vendi dystinum aftur fullkomuliga. Álopsspælið hjá KSG steðgai heilt upp og fingu teir bara eitt mál afturat í øllum dystinum, uppá brotskast! Men fyrst fekk Rani Slættanes minka um munin niður í tað eina málið, áðrenn trý skjótáleyp til Boga Berg so at siga avgjørdi dystin. KSG fekk sídsta kommentarin í dystinum við einum brotskasti í seinastu løtu, men føroyingarnir áttu síðsta orðið og fingu teir enn ein sigur. Endaliga úrslitið gjørdist 26-23 til ÍF Føroyar. 2 stig og eitt fet tættari toppinum!

Málskjúttar: Hjalti Jacobsen 7, Rúni Joensen 4, Bogi Berg 4, Tróndur Bogason 3, Rani Slættanes 3, Helgi Justinussen 3, Johnny Durhuus 1, Niels Viggo Niclasen 1,